## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, týsdagin møguliga hvassur vindur av landnyrðingi. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 10 og 14 stig.

# Føroya størsta lítlatabell

**ROKNING**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tey, ið ikki eiga eina lítlutabell, ella ynskja at síggja hana í stórum formati, kunnu bert fara inn í skúlagarðin í Stranda skúla.

Tveir teir seinastu dagarnar hava nevniliga tríggjar gentur havt sum arbeiði at mála eina lítlutabell niður í sjálvan skúlagarðin.

Hetta er ein partur av summararbeiðinum hjá Sjóvar kommunu, har summi hava lúkað og hampa um ymsastaðni í bygdunum, meðan onnur altso hava verið til arbeiðis í skúlagarðinum.

Samstundis við málingina av teirri stóru lítlutabellini, hevur stóra Føroya-kortið í skúlagarðinum eisini fingið feska máling á.

Hereftir hava næmingarnir onga umbering fyri ikki at kenna land teirra ella duga lítlutabellina!



*Tær brúktu tveir dagar um at mála hesa stóru lítlutabellina í Stranda skúla*
*Mynd: sjóvarkommuna.fo*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 17 |
| Nuuk | 14 |
| Qaqortoq | 17 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 35 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 33 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 13 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 2 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 1 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. í landnyrðing úr Føroyum grynnist nakað.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Írland fer móti Skotlandi og gevur áhaldandi høgætt á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 9/7 kl. 06⁰⁰ – 10/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. 06⁰⁰– 2/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli Seinna kvarter
Jørðin longst frá sólini
9. juli Mánin næstur jørðini
14. juli Tendring

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. Juli | 05.17 | 17.47 | 04.17 | 16.47 | 04.32 | 17.02 | 07.17 | 19.47 | 08.17 | 20.47 | 03.32 | 16.02 | 02.32 | 15.02 | 05.32 | 18.02 | 06.32 | 19.02 | 05.02 | 17.32 | 06.17 | 18.47 |
| 13. Juli | 06.17 | 18.47 | 05.17 | 17.47 | 05.32 | 18.02 | 08.17 | 20.47 | 09.17 | 21.47 | 04.32 | 17.02 | 03.32 | 16.02 | 06.32 | 19.02 | 07.32 | 20.02 | 06.02 | 18.32 | 07.17 | 19.47 |
| 14. Juli | 07.16 | 19.45 | 06.16 | 18.45 | 06.31 | 19.00 | 09.16 | 21.45 | 10.16 | 22.45 | 05.31 | 18.00 | 04.31 | 17.00 | 07.31 | 20.00 | 08.31 | 21.00 | 07.01 | 19.30 | 08.16 | 20.45 |
| 15. Juli | 08.12 | 20.40 | 07.12 | 19.40 | 07.27 | 19.55 | 10.12 | 22.40 | 11.12 | 23.40 | 06.27 | 18.55 | 05.27 | 17.55 | 08.27 | 20.55 | 09.27 | 21.55 | 07.57 | 20.25 | 09.12 | 21.40 |
| 16. Juli | 09.04 | 21.29 | 08.04 | 20.29 | 08.19 | 20.44 | 11.04 | 23.29 | - | 12.04 | 07.19 | 19.44 | 06.19 | 18.44 | 09.19 | 21.44 | 10.19 | 22.44 | 08.49 | 21.14 | 10.04 | 22.29 |